LM-072/2025

FYLGISKJAL 7

Hoyringssvar frá Føroya Pro Vita til uppskot um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (berarakanningar)

Í lógaruppskotinum verður sagt, at *endamálið við uppskotinum er at styrkja sjálvræðið og vitanargrundarlagið hjá einstaklingum og pørum, í sambandi við eina møguliga avgerð um barnsburð.*

Pro Vita metir, at henda orðing er bæði ógreið og etiskt villleiðandi, tí hon kann geva ta fatan, at berarakanning snýr seg um sjálvræði og frælsi, hóast hon í veruleikanum snýr seg um at taka støðu til, hvørji lív fáa loyvi at liva.

Ein berarakanning er ikki tað sama sum ein fosturkanning. Hon sigur ikki beinleiðis, at nakar er sjúkur, men kann vísa, um ein persónur ber eina arvabroyting, sum – um eisini hitt foreldri hevur hana – kann geva sannlíkindini fyri, at eitt barn verður føtt við eini arvaligari sjúku.

Pro Vita ásannar, at slík kanning í sær sjálvum ikki skaðar eitt barn. Men spurningurin er, hvussu vit brúka vitanina, og hvat hon ger við hugburðin í samfelagnum. Tí hóast ein berarakanning kann tykjast einføld og trygg, kann hon broyta mátan, vit hugsa um lív. Tá vit læra at síggja arvabroytingar sum nakað, vit skulu stýra, taka burtur ella fyribyrgja, flyta vit okkum spakuliga frá, at hava virðing fyri øllum lívi — til virðið av útvaldum lívi.

Hetta er tann veruligi etiski vandin. Tí kanningin snýr seg ikki bara um sannlíkindi, men um, hvussu vit fata menniskjalívið sum heild: sum eina gávu at taka ímóti, ella sum eitt val, vit kunnu velja frá.

Fyri Pro Vita er tað týdningarmikið at minna á, at øll lív – eisini tað ófullkomna – hava virði.
Eitt samfelag, sum byggir á virðing fyri lívi, eigur at styrkja ábyrgd, ráðgeving og kærleika – ikki gera skipanir, sum kunnu leggja trýst á pør um at frávelja møgulig sjúk børn.

Eisini vísir Pro Vita á, at lógaruppskotið einki krav hevur um arvafrøðiliga ráðgeving.
Uttan fakliga og etiska ráðgeving gerst "sjálvræðið" meira ein formalitetur enn eitt upplýst val.
Ein persónur kann ikki taka eina etiskt ábyrgdarfulla avgerð um eina kanning, ið kann hava djúpar fylgjur fyri lívið, uttan at skilja, hvat kanningin í veruleikanum merkir, og hvørjar avleiðingar hon kann fáa.

Um berarakanning skal setast í verk, eigur hon tí at hava upplýsandi og lívsverjandi endamál. Ikki eitt endamál, har hon verður fyrsta stig í eini skipan, sum í praksis kann leiða til fleiri fosturtøkur ella eitt frával av ávísum børnum.

Pro Vita ásannar eisini, at summar av sjúkunum, ið møguliga verður kannað fyri, eru sera álvarsamar og lívshóttandi. Tískil kann hugsast, at einstaklingar, ið eru berarar, ynskja at fyribyrgja at fáa børn við hesum sjúkum. Einasta máti at veruliga fyribyrgja, heldur enn at taka lív, er áðrenn gitnað. Tí halda vit, at tað er týdningarmikið at hugsa um, hvør fyribyrging kann verða bjóðað, ið tekur atlit til at verja lív.

Vit nevna her tvey uppskot tikin úr øðrum londum:

- at bjóða berarakanning fyrr, við tí endamáli, at fólk vita, um tey eru berarar, áðrenn tey finna sær maka.
- At smíða eina lóg um eftirgjørdan gitnað, ið leggur dent á at verja lív. Í samband við arvaligar sjúkur merkir tað at kanna egg áðrenn tey verða gitin, og soleiðis ikki enda í støðu, har vit hava sjúk fostur (gitin egg).

Veruligt sjálvræði merkir, at menniskjan fær hjálp til at velja lívið til – ikki at velja tað frá.
Føroyska lóggávan eigur at byggja á virðing fyri øllum lívi – sjúkum, frískum, sterkum og veikum – og tryggja, at tøknin tænir menniskjalívinum – serliga teimum minstu og veikastu í samfelaginum.

Vinarliga

Føroya Pro Vita